# Tá ið TEIR sóu landið



**Í fyrilestri í Norðurlandahúsinum kvinnudagin heitti Marna Jacobsen á allar føroyingar um at lata seg í kynsbrillurnar. Eitt nú í sambandi við málburðin í nýggja stjórnarlógaruppskotinum**



*Marna Jacobsen, cand. phil og ritstjóri á Bókadeild Føroya Lærarafelags*

*Tú tekur meg at tær*
*so tætt í tín favn*
*tit oyggjar so mætar,*
*Gud signi tað navn*
*sum menn tykkum gávu*
*tá teir tykkum sóu*

Ikki er ringt at ímynda sær, at hon, sum tekur teg at sær, er móðurlandið, Føroyar.

Tá ið teir illa tiltuskaðir, landnámsmenninir, meini eg altso, koma at oyggjunum og seta búgv her. Ella sum skaldið kvøður: fyrstur Grímur Kamban í oyggjum festi tjøld. Og so stíga vit fast á várt gólv og flyta fram kvæði um kappabrøgd í Føroya høll – og tað hava vit gjørt líka síðani.

Tað hevur verið sagt, at teir fyrstu, ið komu til landið, vóru írskir munkar, og at tað tí var ógjørligt at fólka landið, tí at teir, hóast førir fyri so mangt, ikki vóru førir fyri at gerast við barn. Men tað hevur undrað meg í mong ár, hvussu landnámsmenninir úr Noregi hava borið seg at gerast við barn, men ivaleyst hava onkrir menn, við kvinnukynsgøgnum verið við á ferðini, tá ið teir sóu landið.

## Maður / menniskja

Í 1881, tá ið Føringafelag í Keypmannahavn varð stovnað, var treytin fyri at gerast limur í felagnum tann, at tú skuldi vera maður, yvir 14 ár og kønur í føroyska málinum. Tá ið nú orðið maður verður sagt eisini at merkja menniskja, skuldi verið natúrligt, at eisini menn við ongum manskynsgøgnum sluppu at vera limir, men so var als ikki.

Malan Marnersdóttir sigur í Kvinnurøddum, at júst málsøguliga merkingin, har samanfall er millum mann og menniskja, vísir, at menniskju vóru menn: teir áttu jørðina, arvin, avgerðirnar og ábyrgdina.” (Malan Marnersdóttir: Kvinnurøddir 1985, s. 30)

Eftir at føroyskar konur í Keypmannahavn høvdu víst sítt ólýdni og stovnaðu egið felag, vórðu treytirnar broyttar í 1897. Orðið maður varð í upptøkutreytunum broytt til ein og hvør, so tey munnu ivaleyst ikki sjálvi hava trúð lygnini um, at orðið maður merkir menniskja, tá ið tað veruliga kom til skarpskeringar.

## Avbyrgda kvinnan

Í bókini Glottar úr kvinnulívi, sum kom út í 1988 er ein sera áhugaverd grein hjá Mariu Jacobsen, nevnd Valdið og skilnaðurin millum kvinnur og menn. Hon vísir á, at bóndasamfelagið var eyðkent av at vera býtt upp í fýra avmarkað øki: húsið, innangarðs, uttangarðs og tað fremmanda, sum lá uttan fyri bygdina. Uppgávan hjá konunum lá í húsinum og innangarðs og hjá manninum uttangarðs, tvs. í haga, bjørgum og sjógvi og í tí fremmanda. Úteftir varð bygdin umboðað av teimum, sum høvdu størst vald, stórbóndum, embætismonnum og kirkjumonnum, “teir áttu lykilin til sannleikan og høvdu tamarhald á medviti fólksins.” (Kirsten Didriksen: Glottar úr kvinnulívi 1988, s. 109).

Menn umboðaðu familjunaúteftir, á grannastevnum, á vártingi og á løgtingi.

Kvinnur høvdu ikki atgongd á tingi, uttan so at tær høvdu gjørt okkurt ljótt, verið ólýdnar, drivið hor, átt leysingabørn og vóru atvold til tey sokallaðu legumálini á tingi.

## Býflugan í reyðum hosum

Kvinnur hava altíð arbeitt, men felags fyri alt kvinnustarv er, at tað í høvuðsheitum ikki hevur verið virðismett á sama hátt sum mansarbeiði, tað sæst best á, hvør ið fær løn, og hvussu nógv tú fært í løn, (undantøk eru sjálvandi). Tær hava eisini verið tættari knýttar at heiminum enn menninir, sum hava røktað haga og sjógv og tikið sær av øllum samskifti úteftir.

Komi at minnast ein konu, sum ein dagin, hon var elligomul tá, slapp ein biltúr av bygdini til grannabygdina, hetta var í 1980´unum og var fyrstu ferð, hon nakrantíð hevði verið uttan fyri eingjagarðarnar úti í tí fremmanda. Hetta verður sagt fyri at minna á, hvussu ótrúliga stutt tað er síðani, at vit trøllkonur lótu eyguni upp og hugdu niðan fjallið, sum Elin Bjørg Højgaard tekur til í einari barnabók, hon skrivaði í 1977, um býfluguna í reyðum hosum.

## Útihýst úr málinum

Óvanin við at ferðast í tí fremmanda ger, at kvinnur, tá ið tær í alt størri mun fara út um heimið, út á arbeiðsmarknaðin og fáa sær útbúgvingar, eru á herrens mark. Tær gerast tá varar við, at har valdar ein ávís, sera óhóskandi fatan av kvinnum og kvinnuleikluti, sum er sementerað í eitt langt tíðarskeið, meðan kvinnur ikki hava luttikið í hesum partinum av lívinum. Tankar, fatanir ja, stutt sagt alt sum hevur við vitskuna at gera, hvussu tú fatar og ber teg at í slíkum umhvørvi, er grundað á eina túsundára langa tradition, har mannlig virði hava bitið seg fast.

Hetta ger seg sjálvandi eisini galdandi í talu og skrift. Talaða og skrivaða málið gevur als ikki rúm fyri henni í almenninum, í staðin er hon í mongum førum útihýst og signalerað verður, at hon er farin inn á serligt mannligt øki.

## Mannaskaptar reglur

Hevur mál nakra ávirkan á hugburð og áskoðanir? Ger málið av hvussu vit hugsa ella endurspeglar tað bara okkara áskoðanir og sosialu viðurskifti?

Hvønn dag skapa vit verðina, vit liva í, eftir mannaskaptum reglum. Vit velja, skipa og tulka hendingafloymir fyri at royna at geva lívi meining, og tað eru fá av okkum, sum hava illgruna av, hvussu djúpt grundfestar og einaráðandi reglurnar eru. Tær eru álagdar okkum soleiðis, at tað, vit síggja, staðfestir tað, vit eru leidd at síggja. Og ein av avgerandi faktorunum í tulking okkara av hesum veruleika er málið.

## Kvinna er fráviki

Merkingarreglar, sum eru partar av máli, eru ikki natúrligar, tær eksisteraðu ikki, áðrenn vit fóru at tosa og lógu bara og bíðaðu eftir, at menniskja skuldi koma fram á tær. Tvørturímóti, tær eru mannaskaptar. Tá ið reglarnar so eru har, so hava tær ein vana at gerast góðkendar og sjálvvarðveitandi, uttan mun til um tær eru grundaðar á misfatanir ella avoldaðan hugburð.

Ein av hesum málreglum er at brúka mannin sum norm. Uttaná kann tað tykjast at vera lutfalsliga meinaleys regla fyri at flokka/skipa lutir og hendingar í verðini, men nærri kanningar avdúka regluna sum eina tað mest gjøgnumtreingjandi og oyðileggjandi reglu, sum er komin til. At hava mannin sum norm, merkir, at standardurin ella